# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ótolandi umstøður

Hølisviðurskiftini hjá studentaskúlanum í Hoydølum eru vorðin ótolandi. Hetta kann uttan víðari staðfestast, og man eingin yvirhøvur vera í iva um, at her má vend koma í. Hví er støðan vorðin so ótolandi? Hvat er tað, sum forðar eini skilagóðari loysn, og hví er skúlin ikki umvaldur fyri langari tíð síðani? Fyrst kann staðfestast, at hesin skúli, sum hevur havt so stóran týdning fyri samfelagsmenningina, altíð hevur verið ein politisk kastibløka. Tá løgtingið í 1937 tók politisku ábyrgdina av skúlanum, átók tingið sær eisini stóra fíggjarliga ábyrgd av at útvega skúlanum hóskandi høli.

Løgtingið livdi ongantíð upp til hesa ábyrgd. Tá landsstýrið eftir 1948 fekk ábyrgdina av skúlanum, gjørdist skilið ella óskilið tað sama. Í áratíggjur var skúlin eitt politiskt klandursmál. Sum dømi kann nevnast, at nýggjur skúli var projekteraður at byggja sunnan fyri plantasjuna í Havn. Alt var klárt, sjálvt arbeiðsskúrarnir vórðu settir upp, tá politikkur kom í málið og alt varð avlýst. At enda samdust flokkarnir um at flyta skúlan í niðurlagda sanatoriið og at byggja út har á staðnum. Bygningurin var ikki tann best hóskandi og var alt ov lítil. Nú er hann niðurslitin og beinleiðis vandamikil. Hetta óskil kann ikki halda fram.

Hvat er so til ráð at taka? Svarið liggur púra greitt: slummið má umvælast skjótast, samstundis sum ein politisk avgerð má takast um staðseting skúlans í framtíðini. Øll sunn fornuft sigur, at skúlin eigur at staðsetast á komandi deplinum í Marknagili. Henda loysn er eftir øllum at døma illa dámd millum lærarar í Hoydølum. Hesir hava sínar grundgevingar, men fyri almenningin er tað ein gáta, at málið onga loysn fær, hvør er veruliga forðingin, hvør so enn stendur við ábyrgdini her og har. Er tað ikki so, at allir hentleikar verða á deplinum í Marknagili, og at staðið har eisini verður karmur um okkara komandi universitet! Hetta mátti tí verið upplagt.

Nú er tolið við at vera uppi hjá øllum. Ein komandi samgonga kann tí ikki loyva sær at rysta á hondini men eigur at gera skjótt av og skapa semju um at flyta skúlan til komandi Marknagilsdepilin ella fáa eina breiða politiska semju um at byggja í Hoydølum. Henda seinna loysnin vita vit verður bæði dýr og órationel sum verklagi og dýr í rakstri. Sama ger, nú má vend koma í.

Móttmælisgongan í gjár var ikki fjas og fjant. Hon avdúkaði eina fullkomiliga ignoranta og ókvalifiseraða støðutakan til eitt stórmál. Hvussu nógva orku brúka vit til at tosa um íløgur í "deyð" ting so sum tunlar. Framtíðin liggur fyrst og fremst í okkara menniskjansliga tilfeingi, og her átti útbúgving av okkara komandi ættarliðum at talt nógv meira.

**Sosialurin**

## Allur bústaðarpakkin er nú framlagdur - vælferðarpolitisk mál fyri tingið 1



Val
HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður

**Í nøkrum komandi greinum ætli eg mær at greiða frá ymisku vælferðarpolitisku málunum, sum verða framløgd og viðgjørd í løgtinginum. Hesaferð um bústaðarpakkan - størsti bústaðarpolitiski reformur í Føroyum**

Hetta snýr seg um:

Lóg um lutaíbúðafeløg, til vanligar lutaíbúðir og til lutaíbúðir til fólk við serligum tørvi

Lóg um at skipa lutaíbúðir sum vardar bústaðir, til eldri og fólk við serligum tørvi

Broyting í lóg um mvg- og rentustuðul, so lutaíbúðafeløg fáa somu sømdir sum aðrir eigarar av egnum bústaði

Uppskot um endurskipan av Húsalánsgrunninum til Trygdarstovn, til at tryggja lutaíbúðafeløgum bíliga fígging,

Uppskot um at veita avdráttarfrí lán til bjálvingar- og orkusparandi tiltøk til pensjonistar úr nýggja Trygdarstovninum

Leigulóg, sum tann fyrsta nakrantíð at tryggja rættindi hjá leigarum kring alt landið,

Lægri skatting av leiguinntøku til tess at økja um útboðið og minkað kostnaðin á leiguíbúðum.

**Reformur fyri alternativum bústøðum**

Síðani politisku avtaluna í samgonguna á sumri 2005 hevur verið arbeitt dúgliga við øllum hesum ymisku tættunum í tí sonevnda bústaðarpakkanum hjá samgonguni – ein slóðbrótandi bústaðarpolitiskur reformur, sertakliga fyri at fáa gongd á ein alternativan bústaðarmarknað í Føroyum. Alternativur merkir í hesum sambandi eitt størri útboð av meira hóskiligum bústaðum, bæði viðvíkjandi støðd og kostnaði, alt eftir tí ymiska tørvi sum einstaklingar og familjur kunnu hava. Arbeiðið hevur verið drúgt og krevjandi, men nú er komið á mál og allir tættirnir í bústaðarpakkanum eru lagdir fyri tingið.

**Lutaíbúðir – nýskapandi bústaðartilboð**

Lutaíbúðalógin er nýskapandi á føroyska bústaðarmarknaðinum og hevur til endamáls at skapa eitt størri og meira fjølbroytt útboð við á fyrsta sinni at gera tað møguligt at fyriskipa bygging av lutaíbúðum í Føroyum – hesin bústaðarháttur kenst úr hinum norðanlondunum sum "andelsboliger".

Økta útboðið av smærri bústøðum við vanligu lutaíbúðafeløgunum er ætlað at skapa munandi fleiri bústaðartilboð til støk, stakar uppihaldarar, til ungar familjur, ið seta búgv á fyrsta sinni, og til fíggjarliga veikar bólkar – ella onnur ið ikki vilja binda seg til fleirmillióna bústaðaríløgur. Somuleiðis skal tað økta útboðið av smærri bústøðum vera eitt tilboð til tey – oftast eldri - sum ætla at skifta ein størri bústað um við ein minni. Við hesum kann bæði fáast eitt størri útboð á sethúsamarknaðinum, so barnafamiljur fáa ein betri møguleika fyri at velja ímillum nýbygging ella keyp av sethúsum, og samstundis fæst ein ringrás ella sirkulatión á bústaðarmarknaðinum, har tann verandi bústaðarmassin verður betur gagnnýttur, enn hann er í dag.

**Lutaíbúðir eisini fyri fólk við serligum tørvi**

Lógin er eisini karmur um serstøk lutaíbúðafeløg, ið skulu standa fyri bústøðum til fólk við serligum tørvi til innrættingina av bústaðnum. Í hesum sambandi er eisini uppskot um at kunna skipa serstakar lutaíbúðir sum vardar bústaðir, tvs. at Nærverkið kann veita serstakar umsorganartænastur til fólk í hesum bústøðum, sum. t.d. eldri og onnur við ymiskum førleikatarni.

Fleiri kommunur hava longu longu víst hesum møguleika ans við byggiætlanum um eldraíbúðir eftir hesum leisti.

Harumframt er lógin eisini tað fyrsta stigið fram ímóti einum skipaðum føroyskum bústaðarmarknaði, tí hon hevur eisini ávísar ásetingar um brúkaravernd í sambandi við keyp og sølu av lutum í lutaíbúðafeløgum.

Hóast ongin av fjølmiðlunum gav tí ans, so var lutaíbúðalógin til 1. viðgerð í tinginum longu 24. okt. og fekk undirtøku frá øllum flokkum.

**MVG- og rentustudningur til lutaíbúðir**

Til tess at gera lutaíbúðir fíggjarliga kappingarførar við sethús og eigaraíbúðir er lagt fyri tingið at broyta MVG- og rentustuðulslógina, so at lutaíbúðafeløg fáa somu studningssømdir frá landinum, sum tey ið byggja ella keypa egin sethús ella íbúðir.

**Húsalánsgrunnurin endurskipast sum trygdarstovnur**

Til tess at tryggja lutaíbúðafeløgum bestu lánimøguleikar á fíggjarmarknaðinum verður Húsalánsgrunnurin tikin av og endurskipaður sum trygdarstovnur fyri lutaíbúðafeløg. Endamálið við stovninum er at hann skal kunna veita serstakum sosialum bólkum, sum t.d. fólki við serligum tørvi og øðrum fíggjarliga veikum bólkum, trygd fyri uttasta váðan av lántøkuni, so tey kunnu fáa so lagaliga fígging til lutaíbúðir, at hetta verður kappingarført alternativ til aðrar bústaðarmøguleikar.

**Stuðulslán til bjálving og orkusparandi tiltøk**

Endurskipaði Húsalánsgrunnurin skal eisini kunna veita pensjonistum avdráttarfrí lán til bjálvingar- og orkusparandi tiltøk.

**Leigulóg at tryggja rættindi leigarans**

Allur leigumarknaðurin í Føroyum liggur mestsum í lógloysi, har leigarin er uttan rættartrygd. Leigumarknaðurin er mestsum eitt svart ella grátt øki, uttan formligan sáttmála millum partarnar, og har útleigarin hevur kunnað gjørt sum honum lystir. Nýggja uppskotið til leigulóg tryggjar rættindi leigarans, bæði viðvíkjandi treytum til góðsku, uppsagnarfreist og móti tilvildarligari áseting av leigukostnaði, umframt mangt annað.

**Økt útboð av leiguíbúðum við lægri skatting**

Í sama viðfangið er eisini sett uppskot fram um at lækka skattingina av leiguinntøkum, til tess at eggja fólki til at leiga út av avlopsella ónýttum bústøðum, og til annars at skunda undir at økja útboð av leiguíbúðum í verandi bústaðarmarknaðinum – herundir eisini at skunda undir átøk til nýbygging av leiguíbúðum burturav.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.